




**Atli Gregersen**
fótbóltsspælari

***Síðani summarferiuna hevur tú verið yrkisspælari í Skotlandi. Hvussu hevur tað upplivilsið verið?***
- Tað hevur verið gott. Mann droymir um at hava góða tíð og hava eitt fantastiskt lív, men eg havi næstan for góða tíð, sjálvt um eg royni at trena nógv.

***Hvussu dámar tær at vera í Ross County?***
- Mær dámar sera væl. Tað er ikki so langt burturi, fólkini eru sera blíð, og tað líkist Føroyum. Ross County er eitt bygdafelag, og tað passar mær væl. Eg trívist væl, og nú manglar tað bara, at eg ordiliga fái spælitíð.

***Hvussu ert tú fyrireikaður til dystin í kvøld?***
- Eg havi ongantíð verið svangari eftir at spæla fótbólt, sum eg eri nú.

***Hvat skal ganga rætt, um tit skulu fáa nakað burturúr dystinum?***
- Vit hava vant nógv taktiskt fyri at verða so væl fyri sum gjørligt. Liðini frá gamla Jugoslavia hava havt gott tak á føroyskum liðum, men seinast Serbia var í Føroyum, høvdu vit 4-5 góðar kjansir. Vit skulu bara skora. Eg rokni við góðum stuðli á Tórsvølli í kvøld, og tá trúgvi eg altíð upp á tað.

# ÍSB hevur ungdómsdagar

Leygardagin 11. september skipar Ítróttasamband fyri brekað (ÍSB) fyri árliga barna- og ungdómsdegnum. Í ár verður tiltakið í skúlanum við Ósánna í Klaksvík.

Hesin dagur ber dám av ítrótti sum ítriv. Her fáa børn og ung, ið bera brek, høvi at hittast og íðka ítrótt. Tey ungu spæla saman og skipað verður fyri smærri kappingum o.t. Eisini sleppa tey at royna boccia, ið serliga er ætlað fólki, ið bera brek.

Høvi verður hjá foreldrum at hoyra meira um tilboð, sum ÍSB saman við feløgunum og kvøldskúlunum kring landið hevur til børn og ung. Í ár verður tað Tóra við Keldu, ið kemur at greiða frá sínum royndum sum ítróttafólk.

Barna- og ungdómsdagurin er ætlaður at eggja teimum ungu at halda fram við ítrótti. Og tað er gleðiligt, at fleiri av teimum halda áfram við venjingum og luttaka í kappingum, sum ÍSB og feløgini Smæran og Svanur skipa fyri.

ÍSB vónar, at nógv fara at taka undir við hesum tiltaki, og at øll fara at fáa ein góðan, virknan og hugnaligan dag saman.

Tilmelding fer fram á tlf 31 75 79 ella isb@isb.fo

Byrjað verður kl 11.00 og tiltakið endar uml kl 14.00.



Barna-og undómsdagurin er fyrst tiltakið á skránni fyri veturin. Eins og undanfarin ár, verða fleiri tiltøk á skránni. Saman við feløgunum Svani og Smæruni verður skipað fyri kappingum og ítróttadøgum í greinunum borðtennis, boccia, frælsum ítrótti, race-running og svimjing.

Kvøldskúlin kring landið fer eisini í gongd við sítt virksemi, við ítrótta- og venjingartilboðum til fólk við tarni.

ÍSB vónar og væntar eitt gott ítróttaár við spennandi kappingum og góðum ítróttaavrikum.

## Í MORGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig.

## SUNNUDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar.Hitin millum 12 og 15 stig.

## MÁNADAGIN




Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassann vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. eystan fyri Skotland fer norðureftir. Eitt lágtrýst, 999 hPa. í útsynning sunnan úr Íslandi fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani fer spakuliga í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Norska Havinum fer spakuliga í landsynning. Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum grynnist og brúgvalagið vestan fyri Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

1. sept Seinna kvarter
8. sept Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. sept | 00:37 | 12:57 | 11:57 | - | - | 12:12 | 02:37 | 14:57 | 03:37 | 15:57 | 11:12 | - | 10:12 | 23:04 | 00:52 | 13:12 | 01:52 | 14:12 | 00:22 | 12:42 | 01:37 | 13:57 |
| 2. sept | 01:49 | 14:14 | 00:49 | 13:14 | 01:04 | 13:29 | 03:49 | 16:14 | 04:49 | 17:14 | 00:04 | 12:29 | 11:29 | 23:55 | 02:04 | 14:29 | 03:04 | 15:29 | 01:34 | 13:59 | 02:49 | 15:14 |
| 3. sept | 02:40 | 15:06 | 01:40 | 14:06 | 01:55 | 14:21 | 04:40 | 17:06 | 05:40 | 18:06 | 00:55 | 13:21 | - | 12:21 | 02:55 | 15:21 | 03:55 | 16:21 | 02:25 | 14:51 | 03:40 | 16:06 |
| 4. sept | 03:32 | 15:58 | 02:32 | 14:58 | 02:47 | 15:13 | 05:32 | 17:58 | 06:32 | 18:58 | 01:47 | 14:13 | 00:47 | 13:13 | 03:47 | 16:13 | 04:47 | 17:13 | 03:17 | 15:43 | 04:32 | 16:58 |
| 5 . sept | 04:24 | 16:51 | 03:24 | 15:51 | 03:39 | 16:06 | 06:24 | 18:51 | 07:24 | 19:51 | 02:39 | 15:06 | 01:39 | 14:06 | 04:39 | 17:06 | 05:39 | 18:06 | 04:09 | 16:36 | 05:24 | 17:51 |